## Dátueftirlitið viðger útseting

**Dátueftirlitið fer nú at taka støðu til, um Elektron kann sleppa at gagnnýta Gjaldskipanina, meðan rættarmálið ímóti løgmálaráðnum og Dátueftirlitinum er**

GJALSKIPAN
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Dátueftirlitið skuldi á fundi í gjár gera av, um avgerðin, at nokta Elektron og peningastovnunum at útbyggja Gjaldskipanina, kann útsetast. Gjaldskipanin avgreiðir sjálvvirkandi flytingar fyri fólk í samstarvi við PBS. Hetta hevur við sær, at upplýsingar fara til Danmarkar at venda, og tað er ikki í samsvari við nýggja kunngerð, heldur Dátueftirlitið.

Elektron hevur stevnt landinum eftir 10 milliónum krónum í endurgjaldi, sum tað hevur kostað at ment skipanina, sum Elektron í fyrstu atløgu fekk loyvi til. Samstundis hevur Elektron biðið um, at skipanin kann halda fram, meðan rættarmálið er.

– Vit fara á fundi í dag at viðgera áheitanina, men tað fer at taka nakrar dagar, kanska einar tvær vikur, áðrenn Elektron fær svar, sigur Turið Debes Hentze, forkvinna í Dáturáðnum við Dimmalætting.

Hon heldur onga orsøk vera at lata rættin tala í tí spurninginum, tí so hevði tað tikið drúgvari tíð at fingið svar. Elektron hevur stevnt vegna seg sjálvt, peningastovnarnar og viðskiftafólk, sum hava mist pening. Elektron tvíheldur um, at avgerðin hjá Dáturáðnum at steðga Gjaldskipanini er skeiv, og at kunngerðin, sum tað byggir sína avgerð á, ikki hevur heimild í lógini um vernd av persónsupplýsingum.

Hvussu er og ikki. Roknast kann við, at eitt rættarmál hjá Elektron, sum er vent ímóti løgmálaráðnum og Dátueftirlitinum, kann taka eini tvey ár, heldur Turið Debes Hentze.

# Útflyta eymar upplýsingar

**Eymar upplýsingar um ognarviðurskifti og skuld hjá føroyingum liggja í einari danskari telduskrá, sum hýsir føroysku Tinglýsingini. Tað er í andsøgn við, at Gjaldskipanin hjá peningastovnunum varð forðað, viðgongur Høgni Hoydal, landsstýrismaður. Hann lovar nú, at Tinglýsingin verður tikin heimaftur so skjótt tilber**

TINGLÝSING
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



*Tinglýsingin skal vera atkomilig á internetinum, sigur lógin. Men so leingi hon liggur í Danmark, mugu føroyingar sláa seg til tols við at kaga í gomlu tingbøkurnar, um tað skal vera ókeypis*

*Mynd: Jens K. Vang*

Tað lekur millum teori og praksis hjá landsstýrismanninum við lógarmálum.

Tað hevur verið ógvuliga umráðandi fyri Høgna Hoydal, at persónligar upplýsingar um viðurskifti hjá føroyingum, eru at finna í føroyskum edv-skráum. Fyri at varðveita lóggávuvaldið á økinum, sigur hann. Tí hevur hann syrgt fyri, at Gjaldskipanin hjá peningastovnunum ikki kann halda fram, tí hon hevur við sær, at persónsupplýsingar fara av landinum, tá føroyingar fremja peningaflytingar sínámillum.

Ta støðuna hevur hann eftir øllum at døma ikki altíð. Í einum øðrum føri hevur hann beinleiðis verið við til at syrgt fyri, at persónsupplýsingar fara av landinum. Talan er um sjálva tinglýsingina, har upplýsingar liggja um ognarviðurskifti, skuld og persónlig viðurskifti hjá tí einstaka føroyinginum. Føroyska tinglýsingin liggur hjá sonevnda Datacentralen í Danmark, sum nú eitur CSC-Danmark.

Í lógini um tinglýsing, sum seinast varð broytt í 2000, verður hetta loyvt.

### Ostaklokkupolitikkur

Alt byrjaði við, at føroyska tinglýsingin skuldi leggjast um frá pappírsútgávu til edv. Tað skuldi viðføra styttri avgreiðslutíðir, betri kunning til borgaran og stuðla uppundir ta tøkniligu menningina yvirhøvur. Sum frá leið er ætlanin, at tinglýsingin verður pappírsleys.

Undir viðgerðini í løgtinginum var tosað um, hvørt skipanin ikki átti at ligið í føroyskari dátuskrá. Landsstýrið helt tað vera lættari, um vit lótu danir leggja skipanina um fyri okkum, tí teir bjóðaðu sær til at gera hetta ókeypis. So kundu vit altíð taka hana heim seinni. Tað er ikki hent enn, og tað fær Hans Paula Strøm, fyrrverandi løgtingsmann, at gera vart við seg í bløðunum í dag.

– Landsstýrismaðurin hevur ikki megnað at fingið hesi viðurskifti í rættlag. Hann sendi tinglýsingina av landinum og hevur ikki megnað at fáa hana aftur á føroyskar hendur, so hon kann verða umsitin eftir lógini og koma undir eftirlit av føroyskum myndugleikum. Tað átti hann og fyrisiting hansara at brúkt kreftirnar uppá, heldur enn henda undarliga og óforstáiliga ostaklokkupolitikkin móti Elektron, sigur Hans Pauli Strøm, sum var limur í Rættarnevndini, ið viðgjørdi lógina.

### Tøkni og yvirtøkur

Høgni Hoydal, landsstýrismaður verjir seg við, at tað tøkniliga ikki hevur borið til enn at fáa tinglýsingina heim, og at málsøkið ikki fult og heilt er komið á føroyskar hendur.

– Tinglýsingin kemur til Føroya. Tað er púra rætt, at tað er líka umráðandi, at hon liggur í Føroyum, sum at Gjaldskipanin virkar í føroyskum høpi. Tað er bara av tøkniligum orsøkum, at tað ikki er hent enn, og tí málsøkið ikki er yvirtikið fult og heilt, sigur Høgni Hoydal.

Tinglýsingin er annars føroyskt sermál, men hon liggur undir Føroya rætti, sum er danskt málsøki. Høgni Hoydal sigur kortini, at tað sjálvandi er hansara ábyrgd, at tinglýsingin ikki er komin á føroyskar hendur enn, tí talan er um eina føroyska lóg.

– Vit eru í ferð við at fáa tinglýsingina yvir á eina føroyska serskrá, og tá vit smíðaðu lógina, tryggjaðu vit okkum eisini, at tað bar til at flyta allar upplýsingar yvir uttan víðari hóvasták. Eg fái kortini ikki sett nakran dato á, nær tinglýsingin verður í einari føroyskari skrá, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður.

# Rætturin fer lætt um lógina

**Føroya rættur, sum umsitur Tinglýsingina, hevur ikki syrgt fyri, at hon er atkomilig á internetinum, soleiðis sum lógin ásetur. Vilja føroyingar ikki gjalda, so kunnu vit heldur ikki krevja, at lógin verður hildin, sigur dómarafulltrúi**

TINGLÝSING
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

»Upplýsingar í edv-skrá eru atkomuligar hjá øllum á internetinum.«

Soleiðis stendur orðarætt í lógini um tinglýsing, sum er galdandi fyri Føroyar. Men grein 50 c, stk. 1 í tinglýsingarlógini, sum seinast varð broytt í 2000, verður ikki hildin. Og tað er rætturin, sum hevur evstu ábyrgdina av, at so er.

Ein grundleggjandi tanki við tinglýsingini hevur verið, at upplýsingarnar eru almennar. Tí hevur borið til hjá øllum at fara oman í Tinglýsingina og lesa í tingbókunum. Tá lógin um tinglýsingina var fyri í 2000, avgjørdi løgtingið í sama anda, at upplýsingarnar skuldu vera atkomiligar hjá øllum á internetinum. Tað eru tær ikki, hóast trý ár eru liðin, síðan lógin kom í gildi.

Søkjast skal um at sleppa upp í skipanina, tú skalt rinda 2000 krónur fyri íbinding, tú skal rinda eitt fast mánaðargjald á 110 krónur, og harafturat skalt tú rinda góðar 3 krónur fyri hvønn tíma, tú ert í skipanina. Hetta er alt í andsøgn við tað, sum stendur í føroysku lógini.

– Fáa vit tinglýsingina á føroyskar hendur, fáa vit hasi viðurskiftini í rættlag. Sum er, ber tað illa til, tí vit mugu laga okkum til donsku skipanina, ið ikki hevur handan møguleikan, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum.

Tað er í evstu løtu rætturin, sum hevur ábyrgdina av, at upplýsingarnar eru tøkar á internetinum. Forsetin í Eystara Landsrætti, sum er ovasti rætturin í føroysku rættarskipanini, hevur sambært lógini eftirlitið við tinglýsingini.

Sostatt kundi verið líkt til, at tað er rætturin, sum ikki heldur lógina. Soleiðis heldur Rannvá Ragnarsdóttir, dómarafulltrúi ikki, at málið hongur saman.

– Tinglýsingin er eitt føroyskt málsøki, sum Føroya rættur umsitur. Tað er eftir okkar ynski, at edv-skrásetingin av tinglýsingini er gjørd í Danmark og koyrd í eina danska skipan. Tá føroyingar ikki vilja gjalda fyri, at skipanin er ókeypis og atkomilig á internetinum, so kunnu vit heldur ikki vænta, at hon er tað. Tann, sum ger lógina, má eisini gjalda, sigur Rannvá Ragnarsdóttir og sipar til løgting og landsstýri.



# Tey liggja vát í turrdokkini á Skála



*Týsmorgunin á Skála. Fram og Vestmenningur eru júst komnir inn í dokkina, har teir verða standandi komandi fjúrtan dagarnar. Skipini skulu høvuðsklassast. Væntandi verða tey klár at fara aftur til fiskiskap um einar seks vikur. Pláss er fyri fýra skipum av hesi støddini í dokkini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen.*

**- Dokkin er sera hent. Skipini standa ógvuliga væl, og tú gongur av bryggjukantinum og beinleiðis umborð. Ikki minst, tá ið stórir fóðurflakar skulu takast upp, er dokkin sum bygd til endamálið, sigur tekniski leiðarin á Skála Skipasmiðju, Dánjal Andreassen**

SMIÐJUVIRKSEMI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Týsmorgunin sigldu partrolararnir, Fram og Vestmenningur, sum eru fyrrverandi Hádegisklettur og Stígarklettur, inn í dokkina á Skála. Dokkin er stór, so eingin trupulleiki var hjá skipasmiðjuni at taka báðar trolarar inn í senn.

### Fýra skip rúmast

Tekniski leiðarin á Skála Skipasmiðju, Dánjal Andreassen, sigur, at fýra trolarar av hesi støddini rúmast í dokkini í senn, men tá er trongligt at arbeiða millum skipini, um tey eitt nú skulu málast uttanborða.

Seinasta »vitjanin« í dokkini á Skála, var annars ein fóðurflaki hjá alifelagnum, Luna í Gøtu. Hesin er nú lagdur út á Lambavík.

- Dokkin er sera hent. Skipini standa ógvuliga væl, og tú gongur av bryggjukantinum og beinleiðis umborð.

Dánjal sigur, at ikki minst, tá ið stórir fóðurflakar skulu takast upp, er dokkin sum bygd til endamálið.

- Tað er eitt sindur torført at taka hesar flakarnar uppá bedingina, tí teir hava í nógvum førum so lítið at standa á. Men ikki tí; tað letur seg rímiliga væl gera.

Hann vísir á, at tað er ikki ofta, at flakar verða tiknir uppá land á Skála, men hesin flakin hjá Luna hevur áður verið í dokkini.

### Høvuðsklassing

Tekniski leiðarin sigur, at Fram og Vestmenningur skulu høvuðsklassast. Motorarnir skulu yvirhálast, og skipini skulu hava aksiltrekk. Haraftrat skulu tey málast, bæði innan og uttan, og lastin verður eisini málað.

Spurdur, hvussu long tíð gongur, til skipini aftur eru klár at fara til fiskiskap, sigur Dánjal, at ætlandi verða tey liðug á Skála um einar seks vikur.

- Vit hava sagt, at skipini verða liðug til jólar, sigur hann.

Dánjal væntar, at Fram og Vestmenningur fara at standa í dokkini einar fjúrtan dagar. Síðan verða skipini løgd til bryggju, har restin av arbeiðinum verður gjørt.

### Lítil aktivitetur

Dánjal veit annars at siga, at rættiliga lítið smiðjuarbeiði hevur á Skála Skipasmiðju í heyst, og serliga lítið hevur verið at gjørt í oktober. Men nú er líkt til, at nóg mikið verður at takast við tað, ið eftir er av hesum árinum.

- Umframt partrolararnar í dokkini, yvirhála vit eisini motorin á trolbátinum, Randi.

Um ein góðan mánaða ella so, kemur eisini rækjutrolarin, Sisimiut hjá Royal Greenland, higar.

- Enn er ikki endaliga greitt, hvussu nógv skal gerast við skipið, men ætlanin er, at trolarin skal takast inn í dokkina til aksiltrekk og annað, sigur Dánjal.

### Skúlanæmingar

Tá ið aktiviteturin minkar, verður sjálvsagt eisini minni arbeiði til fólkið á Skála Skipasmiðju, men Dánjal sigur, at teir royna í mest møguligan mun at halda uppá fólkið.

Í løtuni eru eini 60 fólk í starvi hjá skipasmiðjuni.

- Eins og annað virksemi, er virksemið hjá okkum partvís knýtt at árstíðini. Um sumrarnar kann verða nógv arbeiði á bedingini, og tá hava vit onkuntíð havt skúlanæmingar at hjálpa okkum.

Tekniski leiðarin sigur, at tað ikki er óvanligt, at næmingar, sum eitt nú ganga á maskinskúla, hjálpa til í frítíðini, og tá ið fríløtur eru.

### Okkurt í ljósmála

Dánjal dugir ikki beint nú at meta um, hvussu verður fyrst í komandi ári, men hann hevur tó vónir um, at okkurt stingur seg undan kavi til ta tíð.

- Vit samráðast um ymisk arbeiði, sum endalig greiða enn ikki er fingin á. Vit vóna tó, at onkrir sáttmálar koma undir land komandi vikurnar, soleiðis at okkurt verður at takast við fyrst í komandi ári, sigur Dánjal Andreassen.